# r á meginreglur Bíbliunnar



*Umframt at vera løgtingslimur og floksformaður í Miðflokkinum er Jenis av Rana virkin innan kristiligt arbeiði. Millum annað á útvarpsstøðini Lindini og samkomuni Lívdini í Hoyvík*

*Savnsmynd*

*at sosiala politikkinum hjá tykkum og búskaparpolitikki, so liggja tit til vinstru. Kanska longri til vinstru enn nakar annar flokkur, taka vit støðutakan tykkara til søluna av Føroya Banka sum dømi.*

Tað er rætt. Tó so, at í málinum um søluna av Føroya Banka var tað ikki Miðflokkurin, men eg, sum gekk ímóti. Eg var rættuliga einsamallur við hasari støðuni; tó eg kenni á mær, at hetta hevur hug at broytast. Men nógv av hasum prátinum um vinstra og høgru er bundið at politiskum ideologium sum sosialismu og liberalismu. Tað er ikki nakað, ið vit lata okkum stýra av. Hjá okkum er tað Bíblian, ið er leiðandi. Tað ger tað trupult hjá fólki, ið vilja síggja alt í politiskt-ideologiskum perspektivi, at viðgera okkara politikk. Av tí sama verður tað mangan rangvørt, ið verður sagt um Miðflokkin.

*Ja, tit hava nógv um sosialpolitikk í tykkara stevnuskrá. Men einki, sum vísir til sosialismu. Hinvegin so siga tit í tykkara valskrá til seinasta løgtingsval, at alt almannaøkið eigur at verða endurskoðað "so øll, ið tørva, fáa eina virðiliga hjálp eftir meginreglum Bíbliunnar (Es 58.7)".*

Fyri okkum í Miðflokkinum er eingin ivi um, hvat ið Bíblian sigur um okkara skyldu at verja tann minni menta í samfelagnum móti ágangi og at hjálpa teimum, ið eru komin illa fyri ella í neyð. Tann boðskapurin er greiður og broytist ikki fyri tað, at tað er uppi í tíðini, at flokkar, ið fyrr gjørdu eina dygd burturúr at vera vinstrasinnaðir, í dag kappast um tekkjast miðjuni. Hjartað eigur at vera við. Tað ætla vit at gera meira burturúr, tá ið vit í næstum skulu bjóða okkum fram til eitt valskeið afturat. Tað sama sært tú aftur í okkara støðu til viðurskiftini millum rík og fátæk lond í heiminum, og at vit eru fyri at geva eina menningarhjálp, ið veruliga munar. Tað, at hjartað má vera við í politikki, skal vera okkara aðalmerki.

*Herfyri helt tú 1. mai-røðu á Vaglinum í Havn. Í nógvar mátar flættaði tú traditionell sosialistisk virði saman við boðskap úr Bíbliuni. Tú hevur m.a. eitt sitat: "Ikki ein segði um nakað av tí, sum hann átti, at tað var hansara egna; nei, tey høvdu alt í felagsskapi."*

Hatta sitatið er úr Bíbliuni. Tað stendur at lesa í Ápostlasøguni, og var eisini tað, sum eyðkendi liviháttin hjá teimum allarfyrstu trúgvandi. Her er alt sjálvsøkni farið.
Eingin munur er á lágum og høgum, eingin stættarmunur. Har var javnaður og har var brøðralag, sum eg sigi í røðuni.

*Ja, har hevur tú tveir triðingar av kendu paroluni frá fronsku kollveltingini, men har sum tað vanliga hevur verið "frælsi, javnaður og brøðralag", sigur tú "frelsi" í staðin fyri "frælsi". Tú leggur fyri við at siga, at tú vilt tosa um frelsu. Seinni sigur tú "um frelsu/frælsi" - og tá ið tú so tekur paroluna frá fronsku kollveltingini í 1789 fram, skrivar tú orðarætt "frelsi, javnaður og brøðralag". Orðini frelsa og frælsi renna saman til eitt!? - At tú leggur annað í hetta enn eitt retoriskt orðaspæl, haldi eg meg skilja, tá ið tú setur Frelsaran í samband við "tað ultimativa og fullkomna frælsið". Hetta kundi eg hugsað mær at fingið teg at sagt eitt sindur meira um. Tykkara fatan av frælsi í politikki. Og avmarkingar í hesum.*

Bíbilska orðið frelsa, sum jú er so kent fyri umvending til kritnitrúnna v.m., kemur av frummálsorðinum Sozo. Hetta orðið rúmar tí at verða settur frælsur frá øllum hugsandi fylgjum av syndafallinum, allari tí oyðileggjan, sum tað førdi við sær. Tvs. at tú gerst frælsur til t. d. at kunna broyta kós frá helheimi til Himmals, at verða loyst(ur) frá bundni til t.d. lastir ( rúsdrekka/ evnir v.m. ), verður settur í frælsi frá sjúku, fíggjarligum ófrælsi v.m. v.m. v.m. Hetta frælsið, sum Jesus vann okkum við krossdeyðanum, eiga vit. Men fyri mong er tað í hugaheiminum ov smalt, snýr seg mangan bert um tað at skifta kós frá helheimi til Himmals. Men tað er nógv, nógv breiðari enn so, tað frælsi Jesus ynskir at seta menniskja í. Eitt fantastiskt hugtak, sozo, ein ótrúligur møguleiki, tað ultimativa frælsið - ella frelsan um ein vil. Frælsi= frelsa - ein fantastisktur møguleiki hjá hvørjum einstøkum at taka til sín.

*Tykkara fatan av frælsi og hvat tað inniber fyri politikk kann her tykjast at bresta saman við eina liberalistiska fatan. Vit vóru inni á bannið móti morgunandakt í USA. Tit siga, at reglulig morgunandakt eigur at vera í øllum fólkaskúlum. Hinvegin so hevur spurningurin um "intelligent design", tá ið undirvísingartilfar skal loyvast, verið opin í nógvum amerikanskum statum, serliga í sonevnda Bibliubeltinum. Tað fær meg at spyrja, um tað er tað sama, tit sipa til, tá ið tit siga, at orð Guds, Bíblian, eigur at vera grundarlagið undir frálærutilfari, og eigur frálæran á ongan hátt at mótstríða Bíbliunnar boðskapi. Ella v.ø.o.: Eigur útviklingslæran hjá Darwin at verða útihýst t.d.?*

Ja, heilt erligt, so meta vit, at mangan størri trúgv skal til fyri at góðtaka tilvildarligu og stak óvísundaligu hypotesum Darwins, enn til at trúgva boðskapi Bíbliunnar.
Boðskapurin um hann, fyri hvørjum ein dagur er sum túsund ár, og túsund ár er sum ein dagur, er fyri okkum eingin trupulleiki at trúgva, góðtaka og grunda lív, læru og frálæru. Tað fevnir eisini um frálæru í skúlunum.

*Í tí sama brotinum um frálærutilfarið siga tit, at "bert játtandi trúgvandi eiga at kunna undirvísa í kristni". Hvat merkir hetta í grundini?*

*- Og hvussu hugsa tit tykkum hetta framt politiskt og umsitingarligt?*




Vit hava størri trupulleikar at skilja, hvussu nakar er førur fyri, og hvussu nakar megnar at undirvísa í einum faki sum tey als ikki trúgva uppá. Tað kann ikki vera lætt, og tað man vera trupult at engagera seg og ljóða trúverdur í tí, ein ber fram. Her er talan um so grundleggjandi frálæru, at tað burdi verið trupult at sagt frá, uttan at havt eitt persónligt forhold til tað. Hvussu tað skal fremjast í praksis? - Vitan um slíkt krav ella ynski frá skúlans síðu átti væl heilt automatiskt at fingið lærarar at hildið seg frá at halda seg til at undirvísa í kristni, um teir ikki eru persónliga kristnir - vildi eg meint. Men Berufsverbot - nei, eins og vit siga í spurninginum um fosturtøku, so trúgva vit ikki uppá, at eitt forboðssamfelag loysir nakrar trupulleikar - tvørturímóti.

*Brot úr Bíbliuni ganga aftur í stevnuskránni. Síggja tit hesi sum ófrávíkilig boð, sum okkara lóggáva eigur at laga seg eftir? Tvs. allir føroyingar. Ella er hetta at fata sum tykkara grundgeving fyri, hví Miðflokkurin vil fremja eitt ávíst mál? - At tit eru leidd av hesum til ein ávísan politikk?*

Alt, sum hevur við tað andaliga, tvs. Guðslívið at gera, er frívillugt.

Tó, fyri okkum sum flokk leiða vegleiðingar Bíbliunnar okkum m.a. til konkretan politikk á flestu økjum, og vit

*Framhald á næstu síðu*



Veljarar Miðfloksins eftir aldri samanborið við allar veljarar landsins (í prosentum)